# Søren Ryge Petersen í Føroyum

**Kendi danski sjónvarpsmaðurin, Søren Ryge Petersen, hevur aftur vitjað í Føroyum. Hesaferð snýr tað seg um lundafleyg í Mykinesi**

VITJAN
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*




*Søren Ryge Petersen og myndamaðurin umborð á Froyi í Vestmanna*

Søren Ryge Petersen ger nakrar av best umtóktu sjónvarpssendingunum í Danmarks Radio. Vanliga síggja yvir 500.000 fólk DR-Derude sendingarnar hjá honum, sum allar hava tað í felag, at tær eru gjørdar úti í náttúruni. Fleiri av sendingunum hava verið úr Føroyum, eitt nú tá skúvoyingar fóru í bjørgini í 2005, og í fjør var ein sending gjørd um fólkini í Stóru Dímun.

Nú hevur Søren Ryge Petersen aftur verið í Føroyum, og hesaferð er evnið lundafleygingin í Mykinesi. Søren Ryge Petersen var saman við myndamanninum Egon í Mykinesi í nakrar dagar, har teir filmaðu mykinesmenn tá teir fleygaðu lunda, men ikki minst, tá teir kjakaðust um, hvussu skal vera við fleygingini í framtíðini.

Áðrenn Søren Ryge Petersen fór aftur til Danmarkar sunnudagin var hann ein túr undir Vestmannabjørgunum við Skúvadal. Her eru hann og myndamaðurin umborð á Froyi.

Sendingin um Mykines verður send á DR1 ólavsøkuaftan klokkan 19 føroyska tíð.

# Sýna fiskar fram

**Á ólavsøkuni hevur Føroya Akvariufelag framsýning av akvariufiskum**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*
*post@olivant.fo*

Á framsýningini ber til at síggja vanligar akvariufiskar, sum liva í feskvatni, føroyskar saltvatnsfiskar, akvariurækjur og eisini terrariudjór. Her er talan um teir kendu Nólsoyar froskarnar, suðuramerikanskar pílagiftfroskar, sumpskjaldbokur og onnur djór.

Eisini fevnir framýningin um foroyskt handverk hjá Torgerð Suðuroy, málningalist av Rannvá Dam, Ludda Pedersen og Jón Reynbúð, fiskireiðskap frá P/F Jógvan Weihe og ymisk handaligt handverk.

Tey vitjandu eru aftur í ár dómarir og skulu velja, hvat akvarium tey halda er tað penasta ella tað mest áhugaverda akvariumið á framsýningini.

Framsýningin verður hildin í hølunum hjá Losjuni á Tinghúsvegi 18, og opið er tann 27. juli til 30. juli. 27 juli er opið frá klokkan 14 til 18. 28. og 29. juli er opið frá klokkan 14 til 20, ella so leingi fólk koma innar á gólvi og 30. juli er opið frá kokkan 14 til 18.




**SUZUKI GR. VITARA 2.0 TD VØRUV.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SV 930 **Km:** 64.000
**Árgangur:** sep. 2003
**Útgjald:** 33.750 **Mðr. gjald:** 3.296 (3 ár)
**kr. 135.000,-**



**VW CADDY 1.9 TDI VØRUVOGN.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 915 **Km:** 108.000
**Árgangur:** 01.12.2004
**Útgjald:** 22.500 **Mðr. gjald:** 1.436 (5 ár)
**kr. 90.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 52.000 **Mðr. gjald:** 3.310 (5 ár)
**kr. 208.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 M/M LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UG 268 **Km:** 35.000
**Árgangur:** juli 2007
**Útgjald:** 47.000 **Mðr. gjald:** 2.931 (5 ár)
**kr. 188.000,-**



**PEUGEOT 207 1.6 HDI DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MR 572 **Km:** 60.000
**Árgangur:** okt. 2006
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.313 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 984 **Km:** 135.000
**Árgangur:** apríl 2002
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 3.356 (3 ár)
**kr. 138.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 STC. SOL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LM 312 **Km:** 71.000
**Árgangur:** mars 2004
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.755 (3 ár)
**kr. 155.000,-**



**NISSAN KING CAB 2.5 DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LU 544 **Km:** 40.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 54.000 **Mðr. gjald:** 3.333 (5 ár)
**kr. 215.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HA 241 **Km:** 63.000
**Árgangur:** 14.12.2004
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.064 (5 ár)
**kr. 132.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D TERRA DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.840 (3 ár)
**kr. 158.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við **lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo